Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Elduvíkarvegurin

Spurningar:

1. Eru nakrar ætlanir um at gera ábøtur á Elduvíkarvegin?

2. Um ætlanir eru um hetta, nær kann so roknast við, at arbeiðið verður gjørt?

Viðmerkingar:
Vegurin til Elduvíkar hevur í nógv ár verið í sera vánaligum standi. Fyri nøkrum árum síðani blivu ábøtur gjørdar á vegin, men tíverri eydnaðist arbeiðið ikki so væl. Tað vísti seg, at tilfarið helt ikki, tá veturin kom.
Hóast fá fólk búgva í bygdini, so verður hon nógv vitjað av ferðafólki, og tí er nógv ferðsla eftir vegnum.

Á Løgtingi, 13 juni 2024

Helgi Abrahamsen